# Ósemja um sjúklingavegleiðing

**Leiðarin á Hotel Tórshavn og sjúklingavegleiðarin á Ríkissjúkrahúsinum eru ójavnar á máli um tørvin á sjúklingavegleiðingini**

SJÚKLINGA-VEGLEIÐING
*Edvard Joensen*



*Ósemja er um, hvussu føroyska sjúklingaráðgevingin í Danmark skal fara fram. Leiðslan á Hotel Tórshavn vil hava hana lagda aftur í gomlu skipanina, sum onnur halda vera eina nógv verri tænastu enn ta, sum í løtuni verður givin*

Ósemja er millum avvarðandi partar um, hvør tørvurin á sjúklingavegleiðingini í Danmark er. Leiðarin á Hotel Tórshavn heldur, at tørvurin er nógv minni, enn tað, normerað er. Vegleiðarin heldur ikki, at leiðarin veit rættiliga, hvussu stórur tørvurin í veruleikanum er. Fundur um málið verður í Keypmannahavn í morgin.

Tað er ikki rætt, sum ført hevur verið fram í føroyskum fjølmiðlum, at føroyska sjúklingavegleiðingin í Danmark skal niðurleggjast, sigur Ina Frisdahl, leiðari á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn.

– Talan er um eina umlegging av hesi tænastuni, soleiðis at vit fáa meira burtur úr teimum pengum, vit fáa játtaðar á fíggjarlógini, sigur hon.

Men hvussu hvussu hendan umleggingin nágreiniliga skal gerast, hevur hon enn ikki nakað ítøkiligt boð uppá, annað enn at vegleiðingin skal leggjast undir verandi sjúkrarøktarfrøðingarnar á Hotel Tórshavn, og at fleiri skulu setast í starv, eitt nú sum avloysarar um summarið, fyri tann játtaða peningin.

Í lesarabrævi í blaðnum í dag vísa tveir føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar í Keypmannahavn á, at hendan ætlanin ikki tykist at hava hald í veruleikanum.

Somu hugsan hevur eisini verandi føroyski sjúklingavegleiðarin í Danmark, sum sigur, at heldur enn at umleggja vegleiðinga og geva henni færri tímar, eigur hon at útbyggjst, tí tørvurin er størri enn tann vegleiðingin, sum í dag verður givin.

## Meira fyri pengarnar

Talan er ikki um niðurlegging, men um at fáa meira fyri teir skattapengar, vit fáa at arbeiða við, sigur leiðarin á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn.

Játtaðar eru 280.000,- krónur til vegleiðingina, sigur Ina Frisdahl. Men tað vísir seg, sigur hon, at tørvurin er ikki tann, sum hildið var, tá hendan skipanin varð sett í verk.

Vegleiðingin er normerað til 30 tímar um vikuna, men tørvurin er ikki meira enn seks tímar, sigur Ina Frisdahl.

Hon sigur, at tað hevur víst seg, at teir sjúklingar, ið uttan fylgisfólk koma til sjúkraviðgerð í Danmark uttan um Hotel Tórshavn, eru nógv færri, enn hildið hevur verið. Tó sigur hon seg ikki kunna vísa á nakra nágreiniliga kanning, sum kemur fram til hesa niðurstøðu. Heldur ikki kann hon siga við vissu, hvussu skipanin fer at virka, tá hon verður umløgd. Eingin støða er tikin til hetta enn, sigur hon. Men Sosialurin skilir, at í morgin verður ein fundur í Keypmannahavn, har tosað fer at verða um hetta málið.

Leiðarin á Hotel Tórshavn sigur, at í dag eru átta sjúkrarøktarfrøðingar í starvi á Hotel Tórshavn, leiðarin íroknaður, og at hesar so skulu skiftast um ta sjúkravegleiðing, sum tørvur er á, samstundis sum tær eisini skulu taka sær av øðrum uppgávum, sum eru á hotellinum.

Fyri teir pengar, sum játtaðir verða á fíggjarlógini til vegleiðingina, væntar leiðarin so eisini at kunna seta fleiri fólk í starv, eitt nú sum avloysarar, ið so kunnu avlasta tey, sum eru í føstum starvi.

Men tað fer ikki at ganga út yvir vegleiðingina, sigur hon, tí vegleiðingin fer altíð at verða gjørd av fólki, sum er í føstum starvi og soleiðis kennir til viðurskiftini. Dentur verður lagdur á, at tað altíð er sami vegleiðarin til sama sjúklingin.

Tað metir leiðarin á Hotel Tórshavn ikki fara at verða nakran trupulleika, hóast tað eftir ætlaðu nýggju skipanini kanska gerast einir átta ymiskir vegleiðarar.

– Tí hesum kunnu vit koma út fyri, sum er, hóast bara eina fastur vegleiðari er, um til dømis berst vegleiðaranum frá av einihvørji orsøk, sigur Ina Frisdahl.

## Ógreið útmelding

– Útmeldingin frá leiðaranum á Hotel Tórshavn er ógreið, sigur Eleonora Olsen, sum hevur røkt føroysku sjúklingavegleiðingina í Danmark. Sum eg skilji tað, ið sagt verður, skal farast aftur til ta gomlu skipanina, vit fóru frá, tí ikki varð hildið, at hon var nóg góð. Og hvaðani leiðarin hevur hasar seks tímarnar frá, dugi eg ikki at skilja. Talan skuldi heldur verið um at víðkað tímatalið, tí tørvurin er enn størri, enn tað, vit kunnu veita í dag.

Eleonora Olsen heldur uppá, at tað verður ikki nóg gott, um vegleiðingin aftur skal leggjast undir ta skipan, farið varð frá í síni tíð. Hendan vegleiðingin virkar bara optimalt, um hon er sjálvstøðug, sigur hon.

Hon heldur bart út, at her verður ikki spælt við opnum kortum. Tað eru ongar kanningar gjørdar av tørvinum, annað enn tað, hon sjálv í sínum arbeiði hevur funnið fram til. Og tað vísir, at tað saktans kundi verið brúkt meira einn teir verandi 30 tímarnir um vikuna.

– Hvaðani leiðslan fær hasar seks tímarnar frá, dugi eg ikki at skilja, sigur føroyski sjúklingavegleiðarin í Danmark.

Tað verður ein beinleiðis vanlukka fyri sjúklingarnar, um verandi tænasta verður niðurløgd og flutt undir eina kollektiva vegleiðing av Hotel Tórshavn, metir hon.

Talan er um uppbygt álit á sjúkrahúsinum. Um at kenna mannagongdir og fólk. Stutt og greitt um at arbeiða effektivt, tí ein veit, hvussu farast skal stytsta veg til málið.

– Tað kann bara verða talan um verri tænastu, tá fleiri fólk fara at gera sama arbeiði, sigur Eleonora Olsen, sjúklingavegleiðari.

Og tað ger ikki støðuna betri, at boðað er frá, at enn fleiri fólk í framtíðini fara at verða send til sjúkraviðgerð í Danmark uttan fylgi. Tað krevur upp aftur hollari ráðgeving, vísir hon á.

Hon vísir eisini til fundin, sum verða skal í morgin og vónar, at har fara at koma greiðari meldingar enn tað, higartil er frætt um hetta málið, sum eftir hennara tykki er komið rættiliga tilvildarliga út millum fólk.

Eleonora Olsen er samd við teimum, sum halda, at talan her er um at spara pening gjøgnum bakdyrnar, soleiðis at meira fæst til rakstur av sjúklingahotellinum. Tí hon sær onga sakliga grund til at minka um ráðgevingina.

FAROE
LAW
bjóðar heimligar og altjóða loysnir
Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv
Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

Lesið
internet
Sosialin !






*Ein arbeiðsbólkur undir Føroya Havbúnaðarfelag legði mánamorgunin síni tilmæli fram til føroysku alivinnuna. Bólkurin mælir millum annað til lagaligari skattaviðurskifti og at fíggingarstovnarnir fáa møguleika at fáa veð í aliloyvunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nú skal alivinnan hjálpast

**Lagaligari skattaviðurskifti, niðurberjing av ILA, útlendskur peningur, veðseting í aliloyvum og tryggari marknaðaratgongd til ES eru loysnirnar, sum Føroya Havbúnaðarfelag mælir til fyri, at kreppurakta alivinnan kemur á føtur aftur**

KARMAR FYRI ALIVINNUNA
*Páll Holm Johannsen*
*pall@sosialurin.fo*

Tølini eru ræðandi. Við ársenda 2000 hevði alivinnan 500 mio. krónur í eginogn. Við ársenda í ár, er vandi fyri, at lítil og eingin eginogn er eftir í alivinnuni.

Sjúkutrupulleikarnir og lágu laksaprísirnir eru høvuðsorsøkin til, at føroyska alivinnan er farin frá at verða ein týðandi partur av føroyska búskapinum til eina vinnugrein, sum liggur á gravarbakkanum.

Mánamorgunin legði Føroya Havbúnaðarfelag fram síni tilmæli um, hvørji átøk mugu gerast fyri at venda keðiligu gongdini í alivinnuni. Boðskapurin er greiður. Skal tað verða føroysku alivinnuni lív lag, mugu grundleggjandi broytingar fremjast.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at skattaviðurskiftini hjá alivinnuni gerast lagari, útlendskir íleggjarar skulu hava betri møguleika at koma inn í føroysku alivinnuna, fíggjarstovnar skulu hava loyvi til at fáa veð í alivloyvunum og føroyskir alarar eiga at fáa betri og tryggari marknaðaratgongd til ES.

Hóast røddir hava verið frammi um almennan stuðul til alivinnuna, mælir bólkurin til, at politiski myndugleikin heldur seg til at geva alivinnuna so góðar karmar sum gjørligt, og ikki veitir vinnuni rakstrarstuðul.

## Tørvur á eginpeningi

Arbeiðsbólkurin væntar, at nærum allur eginpeningurin í alivinnuni er fokin við ársenda 2004. Fyri at venda gongdini, er bráðneyðugt við nýggjum innskotum av eginpeningi.

Verandi lóggávu loyvir ikki útlendskum íleggjarum at eiga meir enn ein triðing av partabrøvunum hjá einum alara. Arbeiðsbólkurin mælir til, at forðingin fyri útlendskum peningi verður tikin av og at útlendskir íleggjarar fáa fría atgongd til ta føroysku alivinnuna.

Bólkurin metir, at alivinnan vil reisa seg nógv skjótari, um útlendingar sleppa at seta pening í alivinnuna. Verandi lóggáva avmarkar fíggjarmøguleikarnir hjá vinnuni.

Eigarar av føroysku alibrúkunum eru í dag illa sperdir fíggjarliga og tí verður torført hjá teimum at seta meir pening í vinnuna. Bólkurin nevnir siðvenjurnar við lokalum loysnum, har ein bygd ella økið hevur savnað pening saman til at eitt nú keypa fiskavirki.

Skrivarin í bólkinun, Hans Jákup Mikkelsen, segði undir framløguni, at lokala loysnin var lítið sannlík í alivinnuni. Hann róð framundir, at fíggjartørvurin í alivinnuni er so stórur, at lokala loysnin kemur vall upp á tal, hóast siðvenja er í Føroyum fyri slíkum krepputloysnum.

## Lagaligari skattaviðurskifti

Arbeiðsbólkurin heldur, at skattaviðurskiftini hjá føroyskum alarum eru væl verri enn eitt nú í Noregi. Hetta elvir til verri kappingarføri og tískil mælir bólkurin til, at føroyska alivinnan fær í minsta lagi somu skattaviðurskiftir sum kappingarneytarnir í grannalondunum.

Norskir alarar hava møguleika fyri at framflyta skattalig hall. Í Noregi verður skattur ikki goldin fyrr enn samlaða yvirskotið er størri enn virðið av fiskinum, sum svimur í ringunum.

Við øðrum orðum, kann skattur verða endurgoldin einum felagi innan tvey ár, um tað vísir seg, at felagið fær undirskot í hesum tíðarbili. Norskir alarar kunnu føra hall fram í 10 ár og tað trekkjast av úrslitinum av skattinum.

Síðan 1993 hevur føroyska alivinnan rinda 100 mio. krónur í skatti. Í 2002 vísir allir roknskapirnir hall. Høvdu føroyingar havt norsku skattaskipanina, hevði alivinnan sloppi undan at goldi stóran part av hesum skatti.

Vantandi skattaútreiðslur høvdu komið føroysku alivinnuni væl við í dag og kreppan hevði møguliga ikki verið so álvarsom. Bólkurin mælir tí til, at føroysku alarar fáa møguleika at flyta tap og vinning aftur og fram yvir eitt longri tíðarskeið.

## Veð í aliloyvini

Seinastu mánaðirnar er kjakið, hvørt føroysku fíggingarstovnarnir skulu hava møguleika fyri at fáa veð í aliloyvini veruliga kyknað.

Arbeiðsbólkurin sigur í síni niðurstøðu, at fíggingarstovnarnir eiga at fáa møguleika at fáa veð í aliloyvum. Hetta stig skal takast fyri, at tryggja virðini hjá fíggingarstovnunum. Føroysku peningarstovnarnir hava gjørt vinnuni greitt at fáa teir ikki veð í aliloyvunum, hava teir torført við at ímynda sær, at teir halda á við at fíggja alivinnuna.

Bólkurin mælir tí til, at veðseting í aliloyvini verður møgulig, so peningastovnar og kreditorar fáa møguleika at veita átrokandi og nøktandi fígging til alivinnuna.